# Avloysari fyri lívbjargara

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir einum kvinniligum avloysara fyri lívbjargara til svimjihøllina við Fuglafjarðar skúla fram til 23. januar 2005.

Arbeiðstíðin verður 13 tímar um vikuna.

Lønin verður ásett sambært sáttmálan millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu vera fingin til vega við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006 í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag.

Møguligar umsóknir skulu vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. september 2005 kl. 15.00.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 17. august 2005

**Fuglafjarðar kommuna**

# Kunngerð um kirkjuráðsval

## í Fuglafjarðar kommunu

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður týsdagin tann 8. november 2005.

Í hesum sambandi liggur vallistin frammi til eftirlit á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð frá 23. til 31. august 2005 og hjá Eli Jensen á Hellunum.

Er onkur at misgáum ikki á listanum, skal viðkomandi boða býráðsskrivstovuni frá innan 8. september 2005.

Fuglafjørður, hin 16. august 2005

**Vegna valstýrið**
**Heini Beder**

# Frá Kiwanis Tórshavn

Notarius publicus hevur trekt hesi vinnaranummur.

1) seðil nr. 1604
2) seðil nr. 4770
3) seðil nr. 7093
4) seðil nr. 6991

**Vinnararnir ringja til 314414, 315861 ella 226014.**

Takk fyri stuðulin.

**Kiwanis Tórshavn**

---

**Mentamálaráðið**

Mentamálaráðið
Hoyviksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tel. 35 50 50
Faks 35 50 55
mmr@mmr.fo
www.mmr.fo

## Mentamálaráðið søkir eftir fulltrúa

Eitt starv sum fulltrúi er leyst at søkja. Talan er um eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, sum fevnir um uppgávur, sum hava við at fyrisita, tryggja menning og samstarv innan hægri útbúgving, gransking, mentan, kirkju, søvn, loftmiðlar, ítrótt o.a.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. **Umsóknarfreistin er 5. september 2005 kl. 16.00.**

Meira fæst at vita á heimsíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv).

*Mentamálaráðið*

---

## Mentamálaráðið søkir eftir løgfrøðingi/fulltrúa

Eitt starv sum løgfrøðingur/fulltrúi er leyst at søkja. Talan er um eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, sum fevnir um uppgávur sum lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir, reglugerðir, løgfrøðiliga ráðgeving, vegleiðing til landsstýrismann, starvsfólk, stovnar og borgarar, kæruviðgerð v.m.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Umsóknarfreistin er 29. august 2005 kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimsíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv)

**Mentamálaráðið**

---

## BARNATANNLÆKNASTOVAN

### SØKIR EFTIR TANNRØKTARA

1/2 tíð: í 1 ár frá 1. oktober 2005.
Møguleiki er fyri varðandi arbeiði

Setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Eru ivaspurningar ring 455651
millum kl. 08.00-15.00

Sendið umsókn við prógvum og møgulig tilmæli til Klaksvíkar Kommunu, 700 Klaksvík áðrenn 1 sept. 2005.

**Barnatannrøktin**
Bogi á Steig, tannlækni
Klaksvíkar Kommuna
700 Klaksvík

---

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

## FULLTRÚI Í LØGMANS-SKRIVSTOVUNI

Starv sum fulltrúi í uttanríkisdeildini í Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja við freist 12. september 2005. Starvið fevnir í høvuðsheitum um altjóða handilspolitikk, heruppií handilssáttmálar Føroya við onnur lond, viðurskiftini við Evropasamveldið (ES) og Heimshandilsfelagsskapin (WTO).

**Sí nærri á www.tinganes.fo undir størv.**

---

## EYDNUHJÓL



**verður við Gjógv sunnudagin 21. august frá kl. 16**

**At vinna verður flogferð, lomb í heyst og mangt annað**

**Gjáar Samkomuhús**

---

# Maskinstjóri

Maskinstjóri søkist til norska rækjutrolaran Remøy Viking at byrja umleið 15. oktober.

Maskina: Wartsila 7.500 HK.

Tripple-trawl, 1 túr umborð, 1 túr heima.

**Tlf. 0047 70 08 08 50**
**Fax 0047 70 08 08 60**